# Keflavík vann í evstu løtu

Í íslendsku Landsbankadeildini hava Símun Samuelsen og Keflavík vunnið enn ein sigur. Hesaferð máttu teir í Keflavík bíða leingi í heimadystinum, áðrenn sigurin gjørdist veruleiki. Tá 92 minuttir vóru leiktir skoraði Magnus S. Torsteinnson sigursmálið hjá Keflavík. Símun Samuelsen hevði onkra góða roynd á málið hjá FH, og fekk Símun sær eisini eitt gult kort í dystinum.



# Elfsborg gjørdi bart í Skotlandi

0-0 javnleikurin hjá HB á útivølli í Borås ímóti Elfsborg er nú settur í eitt enn betri ljós. Elfsborg var á útivølli í gjár og leikti fyrra Intertoto Cup dystin ímóti skotska liðnum Hibernian, sum hevur heimstað í Edinburgh. Og sigast má, at svenskarar gjørdu bart. Elfsborg vann 2-0, og eru vánirnar at vinna seg enn víðari í Intertoto kappingini framúr góðar. Emir Bajrami skoraði í 1. hálvleiki, og Andreas Augustsson staðfesti sigurin í 2. hálvleiki. Returdystur verður í Borås komandi vikuskiftið.

# Høvdu tamarhald á

Ovi Nysted, ið enn eina ferð spældi ein góðan dyst í KÍ-verjuni, helt ikki, at hann og liðfelagarnir vóru nakað serliga trýstir í dystinum móti B36.

- Vit skora tvey mál rættiliga tíðliga, og aftan á tað haldi eg ikki, at teir trýstu okkum nakað serligt. So eg haldi, at vit høvdu fult tamarhald á dystinum.

Men tit eru nógv í egnum brotsteigi seinasta korterið ella so. Bakka tit ikki ov langt tá?

- Jú, og tað er ein trupulleiki, sum vit hava havt í ár. Koma vit framum, so søkka vit sera djúpt á vøllin.

Men tað er kanska ikki so vandamikið, tá tveir so luftsterkir menn sum tú og Milic eru í miðverjuni?

- Hatta vóru so tíni orð. Men jú, teir høvdu eina røð av hornaspørkum, sum teir ikki fingu so nógv burturúr. Men annars haldi ikki, at teir spældu so skilagott, tí teir lossaðu nógvar bóltar beint niðan í høvdið á okkum, sigur Ovi, sum annars heldur, at sigurin kom væl við.

- Vit høvdu tapt tvær ferðir á rað, og serliga var talan um ússaligt avrik á Sandi seinasta vikuskifti. So tað hevði stóran týdning fyri okkum at prógva, at vit vóru betri enn tað sama, og at vit við einum sigri komu heilt úr botninum.

*Tit hava nú 17 stig, og frástøðan upp til heiðursmerki er ikki so heilt stór. Droyma tit um at vinna tykkum heilt fram í oddin?*

- Sjálvandi vilja vit vera har, sum lið stríðast um heiðursmerki, men hatta er ein farligur spurningur. Vit hava fleiri víst gott spæl móti ovaru liðunum, men hava havt trupulleikar í teimum dystunum, sum vit eiga at vinna. Tekur tú B71-dystin sum dømi, so skuldu vit slettis ikki spælt í Formula-deildini! So jú, vit hava sjálvandi sum mál at vinna okkum millum tey fremstu, men har er nógv at arbeiða við, áðrenn vit koma so langt, sigur Ovi Nysted.

**-mørk**

# Fáa ikki kjansirnar

Hjá B36 var talan um stórt vónbrot, nú teir ikki fingu stytt frástøðuna upp til oddaliðið, EB/Streym. Men tá neyðugi kjansirnir ikki verða skaptir, er trupult at skora, ásannar Hanus Thorleifsson.

- Eg veit ikki, hvat tað er fyri nakað, men vit hava sera trupult við at skapa nakrar møguleikar í dag.

Tit brúka Odmar Færø frammi í álopinum. Er tað ein neyðloysn, meðan tit bíða eftir nýggja enska áleyparanum?

- Bæði og. Vit royndu hetta undir venjing, og tá riggaði tað væl. Men har kemur ikki nóg nógv burtur úr í dag. Og tað má alt liðið sjálvandi taka ábyrgd fyri. Vit tosaðu annars í steðginum um, at vit høvdu bóltin somikið nógv, at møguleikarnir fóru at koma, og tí hildu vit alla tíðina á at trýsta. Men tað verður sjálvandi tungt. Ikki minst, tá teir fáa tvey somikið keðilig mál somikið tíðliga í dystinum, segði Hanus Thorleifsson.

**-mørk**

KÍ-B36 2-0 (2-0):

# Rodrigo á muni

**KÍ var hvassari liðið á nýggju Injector Arena í Klaksvík. Fyrst og fremst var máltevið hjá Rodrigo á muni í einum dysti, har tað stóra fótbóltsspælið sjáldan kom fram**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

*KÍ*

*B36*



*Tað tók ikki KÍ stórt meira enn hálvan hálvleik, áðrenn teir høvdu sparkað sær stigini í hús sunnudagin*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

Sjálvandi er ein fótbóltsdystur vanliga 90 minuttir – og tað var hann eisini hesaferð – men eftir næsta málið hjá Rodrigo, mundu tey fæstu vera í iva um, at stigini ikki fóru um ella undir Leirvíksfjørð á degnum.

## Kjaftfiskar

Ikki minst tí tey bæði málini vóru rættiligir kjaftfiskar hjá B36 at fáa. Fyrra málið kom, tá Jan Andreasen fyrst var bóltvinnari á miðvøllinum, og síðani sera hegnisliga spældi djúpt til Heðin á Lakjuni, sum rann seg í holið, sum Santos læt eftir seg í verjuni. Í fyrstu atløgu gav innleggið einki, men tá bólturin datt fyri føturnar á Rodrigo, ivaðist hann ikki minstu løtuna, áðrenn hann smekkaði til.

Og seinna málið kom eftir ordiligt verjukiks. Klæmint Matras, sum hesa ferð var í miðverjuni fyri skadda Herbert í Lon Jacobsen, stútaði ov spakuliga aftur til málverjan. Uppbakningurin var á onga hátt soleiðis, sum lærubøkurnar fyriskriva. Og so smoygdi Rodrigo sær avstað við bóltinum, rundaði Meinhardt Joensen og legði bóltin í netið.

## Linligt

Hóast tvey mál aftanfyri, so royndi B36 at reisa seg. Og í longum løtum av tí, sum eftir var, royndu teir eisini at trýsta KÍ.

Men stóri trupulleikin var, at teir sjáldan vórðu serliga vandamiklir, og tí eydnaðist ikki at stressa KÍ-verjuna nakað serligt. Turri vøllurin legði ikki upp til skjótt spæl eftir jørð, og tá klaksvíkingar samstundis stóðu væl, fingu teir hvítu sera sjáldan spælt seg í yvirtalsstøður. Súni Olsen royndi við nøkrum sendingum at taga KÍ-verjuna út í borðini, og partvíst eydnaðist hetta. Men við Ova Nysted og Milic Curcic í mótstøðuverjuni er kravið, at kvaliteturin á innleggunum skal vera betri enn tað, sum B36 vísti sunnudagin. Og veruleikin er eisini, at bjargingin, sum Jákup Mikkelsen hevði upp á skotroynd frá Oddmar Færø fýra minuttir eftir steðgin, var einasta veruliga uppgávan hjá landsliðsmálverjanum.

Klaksvíkingarnir hildu støðugt høvdið kalt, tó at teir bakkaðu langt móti dystarenda. Denturin varð nú fyrst og fremst lagdur á, at mótstøðan ikki skuldi sleppa ígjøgnum, og so bíðaðu teir tolnir eftir kontramøguleikanum, sum púrasta kundi avgera dystin. Amerikanski Joe Zeewe hevði eisini tveir av slagnum, men hvørga ferðina var hann nóg kaldur til veruliga at hótta, og móti dystarenda var Sigmund Jacobsen nakrar sentimetrar ov stuttur til innlegg frá Heðini á Lakjuni.

Fortreytirnar, sum vórðu skaptar fyrstu løtuna, bóru samstundis við sær, at talan sjáldan gjørdist um ta stóru fótbóltsupplivingina. KÍ hevði ikki tørv á meira, og á degnum maktaði B36 ikki meira, og so gjørdist talan um rímiliga linliga uppgerð, har undirhaldsvirðið sjáldan gjørdist tað stóra.

## Mistu

Hjá KÍ bar sigurin fyrst og fremst við sær, at liðið mest sum endaliga kundi veittra heilt farvæl til niðurflytingarvandan, sum annars var komin nakað nær eftir tveir ósigrar á rað. Og vil væl til, so kunnu klaksvíkingar kanska ota seg upp í bólkin, sum stríðist undir einsamalla oddaliðnum.

Hjá B36 merkti tapið í fyrstu atløgu, at liðið nú er nummar fimm, og tað hava teir ikki verið áður hetta kappingarárið. Men tað nívir ivaleyst fast, at teir ikki megnaðu at stytta munin upp til EB/Streym, nú oddaliðið tapti. Komandi umfarið skal B36 takast við júst EB/Streym, og tí kundi nakað av spennindi verðið skapt við einum sigri í Klaksvík. Ikki minst tí B36 við tilgongdini av Súna Olsen og komandi tilgongdini av Sam Malson hevur givið til kennar, at teir vilja í oddin.

Men hóast einstakar góðar detaljur, so líktist Súni Olsen ofta einum hálvblindum ferðamanni, sum als ikki hevur neyðugu dystarvenjingina í beinunum. Og so leingi sum pappírini upp á nýggja áleyparan ikki eru komin til Føroya, fær hesin heldur ikki hvest álopið, sum hesa ferð tóktist ógvuliga tannleyst. Og sum tí tapti 2-0 móti Rodrigo.